# Tá løgtingið fylti 100 ár

**Um Ólavsøkuna hátíðarheldur Føroya Løgting sín 150 ára dag fyri endurstovnanina og fyrsta bind av søgu tingsins er longu handað tingsins formansskapi. Fyri 50 árum síðani, í 1952, var eisini hátíðarhald, tí tá helt løgtingið sín 100 ára dag síðani endurstovnanina í 1852**

LØGTING

Føroya Løgting hátíðarheldur um Ólavsøkuna, at 150 ár eriu liðin síðani endurstovnanina í 1852. Tingformenn úr grannalondum í útnorði eru gestir og veitsla er fyri innbodnum. Hetta verður beint eftir gustænastuna ólavsøkudag og eftir ólavsøkurøðu løgmans.

Í samband við 150 ára dagin verður givin út søga tingsins í trimum bindum harav tað fyrta er komið.

Tinghúsið verður umbygt og umvælt, men kann tó takst í nýtslu til ólavsøkuna. Tinghúsið varð bygt á Husabøi stutt eftir endurstovnan løgtingsins og har stendur tað enn. Áðrenn vóru tingfundir í Gongini í gomlu tingstovuni, sum varð bygd í 1662, og sum eisini hýsti tinginum, til tað varð niðurlagt í 1816.

Nýggja húsið á Húsabøi var liðugt í 1856 og var 14x16 alin.

Í 1906 var gjørt av at víðka húsini og at umbyggja.

Á fyrstu hædd var tingsalur, sitistova, floksrúm hjá sambandsflokkinum, tvær forstovur og toilett. Á loftinum vóru hesi rúm: Í syðra enda, millum tingmenn kallað "Suðurpólurin", hevði javnaðarflokkurin floksrúm, á kvistinum hevði fólkaflokkurin floksrúm, og í norðara enda, kallaður "norðpólurin", var floksrúm tjóðverdisfloksins. Millum norðpólin og kvistin hevði framburðsflokkurin floksrúm, og millum suðurpólin og kvistin hevði sjálvstýrisflokkurin floksrúm. Rúm sjálvstýrisfloksins varð millum tingmenn kallað "heilsunevndin" og í hesum rúmi plagdu tingmenn vanliga at spæla kort. Áðrenn ferðasambandið varð so væl útbygt, at ferðast kundi til og úr Havn hvønn dag, vóru tingmenn vanliga í Havn fyri vikuna, meðan tingfundir vóru, og til at stytta sær stundir gingu kortspølini hvørt kvøld á tinghúsloftinum, og so stórur var áhugin millum tingmenn fyri kortspæli, at eisini tingmenn úr Havn vóru í tinghúsinum um kvøldið og spældu kort.

Í 1977 varð tinghúsið aftur umbygt. Arkitekturin J.P. Gregoriussen stóð fyri umbyggingini.



*Løgtingshúsið í fimtiárunum. Í 1952 fylti tingið 100 ár*

### 1852 - 1952

Føroysku bløðini gera í 1952 eitt sindur burturúr 100 ára degi løgtingsins. Dimmalætting og Tingakrossur nevna nakað av tí, ið hátíðarhaldið fevnir um.

Bløðini prenta søguyvirlit og heilsanir og røður. Tað sæst, at til staðar eru varaformaður landstingsins og forsætisráðharrin, umframt gestir úr Finnlandi, Íslandi, Noreg og Svøríki. Tingið er eisini fult av fólki.

Eitt sindur verður sagt um søguna tey 100 árini, ið farin eru av tingsøguni.

Ymiskt hevur óivað verið, hvussu endurreisnin av tinginum hevur verið umhildin.

Stuttligt er í dag at tríva í eitt brot um embætisvaldið, nú vit fyri fáum árum síðani hava fingið nýggja stýrisskipanarlóg, ið hevði umfatandi broytingar við sær.

Í grein í Tingakrossi í 1952 stendur millum annað soleiðis í grein um løgtingið gjøgnum 100 ár:

"Men annars varð stríðið móti embætismonnunum donsku nógv hildið fram í tjóðskaparpolitiki...." "Ein stórur partur av embætismonnunum er við nýskipanina í 1948 komin undir føroyskt ræði og eingin skila føroyingur kann í dag vera so blindur, at hann ikki hevur ferilin av, at eitt nýtt stríð við føroyskt embætisvald er í umbúna.

Nú gongur nógv dult fyri seg í føroyskari umsiting og landsstýrið við sínum tænastumonnum hevur í síðstuni tikið sær rætt til at gera mangt einsamalt, sum ikki áður hevði verið tolt donskum embætismonnum..."

### Landsframsýning

Í bløðunum er eisini prentað røðan, sum statsminister Erik Eriksen helt tann 29. juli 1952. Hann sigur seg millum annað fegnast um, at hann hevur verið við til at fáa í lag heimastýrisskipanina, sum hann metur

*Framhald á s. 23*





*Í 1952 kom Friðrikur kongur á Havnina eftir at hava verið á vitjan í Grønlandi*



Løgtingið 150 ár:

# Besta boð uppá elsta ting í Europa

**Tingsøgan er komin út í bók. Finnbogi Ísakson, formaður í ritstjórnini og fyrrverandi tingformaður, handaði hósdagin Edmundi Joensen, tingformanni bøkurnar, ið bera heitið Løgtingið 150. Hetta er tingsøgan frá landnámi og fram og er hon ætlað øllum Føroya fólki**

LØGTINGIÐ 150 ÁR

*Dagfinn Olsen*

Formaðurin í ritstjórnini og fyrrverandi tingformaðurin Finnbogi Ísakson, handaði hósdagin Edmundi Joensen tvey tey fyrstu bindini av tingsøguni.

Heitið er Løgtingið 150. Talið 150 er eitt sindur kámt á permui, tí í veruleikanum er tingið meira enn 150 ár, segði Finbogi Ísakson á samkomu á løgtingsskrivstovui hósdagin.

Hans Andrias Sølvar á hevur staðið fyri stórum parti av fyrsta bindinum, ið viðgerð tingsøguna. Annað bind hava seks fólk skrivað og finna vit har m.a. øll tingfólk, ið hava verið. Tey eru eini 440 í tali og mynd er av teimum flestu. síåsta bind kemur í heyst og har verður m.a. valtøl og leitorð at fina, greiddi Finnbogi Ísakson, sum vegna ritstjórnina handaði tingformanninum bøkurnar. Í ritstjórnini hava, umframt Finnboga, sitið Súsanna Danielsen, Jákup Thorsteinsson, Demmus Hentze og Pól á Kletti.

Edmund Joensen takkaði fyri og fegnaðist um, at tingsøgan nú loksins er komin í bók, tí hetta hevur áður verið ætlan, sum er dottin niðurfyri. Hann metir hetta sum ein dýrgrip og førdi fram, at hugaligt er at merkja sær, at løgtingið óivað er besta boð uppá ellsta ting í Europa.

### Til alt fólkið

Finnbogi Ísakson segði á samkomuni hósdagin, at hugsað er um, at øll skulu hava ráð at ogna sær tingsøguna, tí hon er fyri alt fólkið. Bind eitt og tvey verða seld saman í bókhandlum fyri 150 krónur og bind 3 kemur at kosta 75 krónur.

Edmund Joensen segði, at formansskapur løgtingsins hevur biðið ritstjórnina halda fram og kemur bind nummar 3 ætlandi í heyst.

Roknað var við, at bókaætlanin kom at kosta einar 2 milíónir, men staðfestast kann í dag, at kostnaðurin er væl undir. Kanska 1,2 millíónir, ella har á leið.

Fyrsta upplag av tingsøguni er 2300 eintøk.



*Formaðurin í ritstjórnini og fyrrverandi tingformaðurin Finnbogi Ísakson, handaði hósdagin Edmundi Joensen tvey tey fyrstu bindini av tingsøguni*



*Tinghúsið í 1906*

*Framhald av síðu 22*

sum eina av sínum áhugaverdastu uppgávum. Somuleiðis tekur hann til eftirtektar, at landafrøðiligu og vinnuligu viðurskiftini í Føroyum eru so ymisk frá teim donsku, at fyrilit ikki bara má, men skal takast fyri hesum, tí tað er alneyðugt.

Ov drúgt verður á hesum stað at taka til viðgerðar alt, ið fór fram við 100 árahaldið og djúpt innlit í viðurskiftini fær ein heldur ikki við bert lættliga at kaða í bløð frá 1952. Men søga tingsins er nú komin út í bók og har fæst størri innlit.

Men tað skilst í bløðunum frá 1952, at skipað var tá fyri sonevndari landsframsýning, ið millum mangt annað eini hevði á skránni eina løgtingsframsýning við m.ø. fundarbókum.

### Kongur vitjar

Í ár, við 150 ára føðingardag løgtingsins, er ikki umboð fyri kongshúsið við. Sambært løgtingsformanninum er ein orøk, at slíkt má leggjast ætlan um í sera góðari tíð, tí tey kongaligu hava úr at gera og hava drúgva skrá.

Heldur ikki í 1952 var kongur til staðar við hátíðarhaldið. Men hann vitjaði tó í 1952. Í august kom Fríðrikkur kongur inn á Havnina við kongaskipinum, eftir at hava vitjað í Grønlandi, og fekk hann tignarliga móttøku.



*Ólavsøka uttan fyri tinghúsið í 1930*

Í dag, við 150 ára dag løgtingsins, stendur løgtingshúsið ikki liðugt, eftir enn eina umbygging, ið eisini umfatar bygningin hjá Føroya Tele, sum nú eisini gerst partur av tinghúsinum. men tó er komið so mkið á leið, at húsið kann takast í nýtslu.

Við nýggum tinghúsið og nýggjari bókarøð um søgu tingsins verður stevnt mót teim 200 árunum í søgu løgtingsins.